# Eru føroyskar kommunur klárar at yvirtaka eldraøkið?

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Omanfyri nevnda spurning havi eg mangan sett mær sjálvum.

Ikki tí, eg eri onga løtu í iva um, at tað eru tær í nógvum førum. Men so skal arbeiðslagið broytast munandi!

Hugsi um, at mangan tá okkurt ikki riggar, so eru kommunurnar skjótar at leggja dent á, at hesum málinum hevur landið alla ábyrgdina av, meðan tá okkurt riggar, so er tað kommunalu politikararnir, ið hava rós uppiborið fyri tað.

Fremstur í hesum kóri er góði vinur mín, Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Eg skal taka okkurt aktuelt dømi:

Stutt fyri jól samtykti løgtingið at taka av stuðul til kommunalu dagtilhaldini, ein stuðul, ið var 4 milliónir árliga.

Beinan vegin vóru fleiri kommunur klárar at ákæra landið fyri at steingja øll dagtilhaldini.

Eg skal ikki vera ósamdur í, at eldrarøktin er landsmál og ikki kommunal.

Men hinvegin so hava nógvar kommunur stovna kommunal dagtilhald, ið hava fingið ein ávísan stuðul úr landskassanum.

Hjá Sunda kommunu er støðan tann, at hetta dagtilhald sambært fíggjarætlanini fyri 2009 kostar tilsamans 279.000 kr., og av hesum var stuðulin úr landskassanum 45.000 kr.

Kann man so siga, at landið steingir dagtilhaldið, tá landsins partur bert er 16%? Eg haldi ikki! Hetta má ein kommuna klára, um hon heldur seg til at yvirtaka eldraøkið í framtíðini!

Hoyrdi um dagarnar, at Tórshavnar kommuna hevði trupult at finna eina millión til dagtilhaldini.

Samstundis biður hendan kommunan um at gerast royndarkommuna á eldraøkinum.

Sig mær, hvussu kann Tórshavnar kommuna nakrantíð koma at umsita eldraøkið, tá hon ikki kann finna eina millión til dagtilhald burtur úr einari fíggjarætlan, ið liggur um hálva milliard?

Eitt annað dømi eru røktarheim og dagtilhald.

Um hetta økið verður mangan sagt, at hetta er 100% landið, ið hevur tað.

Men tað passar ikki. Tað hevur tað heldur ikki verið gjøgnum tíðirnar.

Skipanin fyrr var tann, at kommunurnar rindaðu 10% av rakstrinum og 15% av íløgunum. Ikki nakar stórur partur, men økið var so ikki 100% lands.

Síðani vórðu umskipingar gjørdar í fíggjarbýtinum millum landið og kommunurnar, eg haldi at tað var tá barnaansingarøkið varð lagt út.

Tá gjørdist raksturin av sambýlum og røktarheimum landsins partur burturav. Tó so, náttarvaktin á sambýlunum bleiv kommunal.

Fyri einum 6-8 árum síðani varð nýggj skipan gjørd um bygging av sambýlum og røktarheimum, soleiðis at landskassin rindaði 50.000 kr. fyri hvørt pláss á sambýlum og 500.000 kr. fyri hvørt røktarheimspláss. Restina av íløgunum skuldu kommunurnar standa fyri.

Hetta var ein skipan, ið fyrst varð gjørd til røktarheimið Mørkina í Streymnesi, men brátt gjørdist skipanin landsumfatandi.

Kommunurnar í Eysturoy og tær í Norðstreymi, sum í dag eru partur av Sunda kommunu, settu tá eldraøkið ovast á dagsskránna, og strektu seg sera langt at fremja neyðugu útbyggingarnar á økinum.

Og tað hevur borið frukt. Sá í einum blað herfyri, at seinastu 6 árini eru 89 røktarheims- og sambýlispláss komin í Eysturoy, meðan bert 42 eru komin í Suðurstreymoy somu tíðina.

Hetta vísir tíðuliga, hvussu kommunurnar hava raðfest eldraøkið!

Hevði Tórshavnar kommuna raðfest eldraøkið eins høgt og kommunarnar í Eysturoy tá fyri 6-8 árum síðani, so høvdu millum 150 og 200 pláss verið komin afturat har – í staðin fyri 42.

Og so høvdu hesir trupulleikar ikki verið so stórir, sum teir eru í dag.

Eg haldi ikki, at Tórshavnar kommuna bert kann skjóta við skørpum eftir landsins myndugleikum í hesum máli, tey máttu eisini kunna hugt eftir sínum egna leikluti.

Í heila tikið mega landsins myndugleikar og kommunurnar fáa í lag betri samskifti við hvønn annan í staðin fyri at liggja í hvør sínum skotgrøvum og skjóta alment eftir hvørjum øðrum.

Skal nakað munagott koma burturúr, mega vit hava konstruktivar samrøður innanhýsis fyri at loysa málini, í staðin fyri at kappast at fara í fjølmiðlarnar at skylda upp á hin partin.

Duga vit ikki tað, so trúgvi eg onki uppá, at slík stórmál verða røkt til fulnar, um tey verða løgd til kommunurnar.

# Bleytu virðini bumbaði aftur í tíðina!

JARVIN FEILBERG HANSEN

Formaður í Føroya pedagogfelag



So hendi tað aftur. Almennu sparingarnar raka enn einaferð tey veikastu í samfelagnum.

Vit hava hoyrt um hvussu illa tað stendur til á eldra økinum, sjúkrahúsøkinum, skúlaøkinum o.s.fr. – og nú er øksin so komin til tey menningartarnaðu - Økið, Børn og ung.

Trivnaðartænastan, sum er ein deild undir Nærverkinum, hevur nú fingið boð uppá at spara 2,3 milliónir. Harumframt frættist eisini herfyri, at stovnar fyri børn og ung skulu spara 5,2 milliónir.

Hetta eru sparingar, sum av álvara fara at merkjast. Hetta er ikki ein tunnil ella eitt vegarbeiði, sum kann útsetast, men menniskjaligar lagnur, sum fara at kenna sviðan av sparingunum

Undan valinum sólaðu allir flokkar sær í teimum bleytu virðunum, men sum ikki einaferð, so er hetta valagn – og tað er ótrúligt sum hetta er gott agn – kann sigast. Nógvir veljarar býta í hetta agni, men sumaltíð eru hetta tóm lyfti.

**Trivnaðartænastan**

Trivnaðartænastan skal spara 2,3 milliónir. Hetta er sami kostnaður, sum at reka eitt sambýli.

Tað verða, sum er, ikki sett fleiri starvsfólk á stovnunum – og sum skilst, so er alt skeiðsvirksemi og øll førleikamenning løgd á ís. Ongir avloysarar skulu inn á stovnararnar – so hetta fer uttan iva at hava stóra ávirkan á gerandislívi hjá búfólkum og starvsfólkum, sum eru á stovnunum. Tað pedagogiska menningin steðgar upp – og hetta kann eisini hava keðiligar ávirkanir á lívið hjá búfólkunum, sum hava brúk fyri pedagogiskari stimbran.

Er hetta í tráð við samgonguskjalið? Ein nýggj føroysk forsorgarlóg hevði hægstu raðfesting hjá landsstýriskvinnuni, tá hon ok sæti sum landsstýriskvinna – og sum skilst, so er hetta arbeiðið eisini lagt á ís. Kunnu vit sum eitt vælferðarsamfelag, sum vit í orð og talu kalla okkum, liva við ikki at hava eina nútíðarhóskandi forsorgarlóg. - Eina lóg, sum eisini greitt ásetur, hvat endamálið er við sambýlunum.

Landsstýriskvinnan, Rósa Samuelsen segði við Sosialin tann 28 januar, at tað sum er lívsneyðugt ikki skal sparast. Alt skeiðsvirksemi skal leggjast á ís og steðgur er í øllum starvsetingum.

Mín spurningur er: Hvat er lívsneyðugt?.

Hetta eru ikki nakrar upplyftandi útsagnir frá okkara Landsstýriskvinnu, men harafturímóti veruligar kreppuútsagnir.

**Børn og Ung**

5,2 milliónir skulu sparast á virkseminum fyri børn og ung. Hetta kemur at hava stóra ávirkan á núverandi stovnar, sum eru Rókin, Slóðin, Barnaheimið og Familjuhúsið. Landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen, hevur ført fram, at hetta fer ikki at ávirka núverandi virksemi – og tað tykist mær ógvuliga løgið. Sum støðan er í dag, so vita starvsfólk á hesum stovnum hvørki um tey eru keypt ella seld. Rósa Samuelsen førdi í Degi og Viku fram, at ein arbeiðsbólkur var settur fyri at finna útav, hvussu økið framyvir skal síggja út ella rekast, og at ein niðurstøða skuldi koma í hesi vikuni. Vit fingu ikki at vita hvør situr í hesum arbeiðsbólki – og starvsfólk og børn á teimum ymisku stovnunum eru sera ótrygg yvir hvussu framtíð teirra fer at síggja út. Á onkrum stovnum er støðan so mikið álvarslig, at starvsfólk eru einsamøll á vakt alt samdøgnið – og børnini, sum eru á stovninum eru illa fyri og krevjandi, at starvfólkini als ikki kunnu taka ábyrgd av hesum børnunum. Stovnsleiðslurnar hava eisini fingið at vita, at tey ikki kunnu taka avloysarar inn um tey hava brúk fyri hesum. So tað er eitt stórt maktarloysi, sum valdar á økinum.

**Alment umsorganarsvik**

Tá børn og ung verða innskrivaði á ein stovn, eru ymiskar orsøkir til tess. Hetta eru børn, sum á ein ella annan hátt ikki kunnu búgva heima – og mangan krevja ein stóra eyka pedagogiskan innsats. Sum støðan er nú, so kunnu starvsfólk ikki veita hendan pedagogiska innsatsin, tí tað er ikki nokk av starvsfólkum at taka sær av børnunum. Eg vil kalla hetta almennt umsorganarsvik. Mín áheitan til landsins myndugleikar er tískil. Skapið karmar fyri hetta økið ístaðin fyri at bróta karmarnar niður!

# Hvør er pínligur?

KAI VÁGFJALL



Fyri nakað síðani skipaði danska stjórnin fyri einum sokallaðum bankapakka, sum skuldi hjálpa bankunum, um teir komu í trupulleikar, nú fíggjarkreppan ger um seg. Føroysku bankarnir, sum eru partar av danska fíggjarkervinum, fingu loyvi at verða við í hesi skipan. Hetta er ikki bara fyri okkara skuld, og kemur ikki bara okkum til góðar, tí, sum sagt, okkara fíggjarkervi er partur av tí danska.

Seinri er so danska stjórnin komin við enn einum pakka, at hjálpa bankunum við. Eftir umbøn frá landstýrinum, varð biðið um loyvi at luttaka í teimum samráðingum, sum fóru fram, hesum viðvíkjandi, men hetta var sýtt okkum, hóast hetta upprunaliga var lovað okkum, og hóast føgru orðini um "lige værdige parter".

Tá Høgni Hoydal setti forsætisráðharranum fyrispurning hesum viðvíkjandi, gjørdist Edmund Joensen, sum ikki einaferð, óður og fór í part við dønum, sum hann er vanur, og háðaði okkara umboð, og tók fult undir við, at vit føroyingar hava einki at gera við samráðingarborðið, hóast lyftir vóru givin um hetta. Sostatt gekk Edmund Joensen enn einaferð ímóti ynskinum hjá bæði landsstýrinum og sambandsløgmanninum. Um tað ikki er pínligt, so veit eg einki. Í bløðunum samanlíknar hann lánið, sum vit góvu íslendingum við bankapakkan, sum als einki hava við hvørt annað at gera.

Vit minnast øll, tá Edmund kallaði inn til tíðindafund, og fekk løgmann at hoppa uppá hansara bluff, at nú hevði hann, Edmund, ruddað sló fyri, at Føroyar kundu sleppa inn í ES – sjálvandi sum danskur landslutur!!! Var tað ikki pínligt bæði fyri løgmann og fyri alt føroya fólk, at ein sum vil takast í álvara, og er valdur til at umboða okkara land millum aðrar tjóðir, kallar inn til slíkt fjas???

Edmund er valdur inn á danating at umboða Føroyar og føroyingar, men higartil hevur hann ikki gjørt annað enn runnið ørðindir fyri Fogh og donsku stjórnina, og gjørt alt tað hann kann, at vera ímóti Føroyum og føroyingum.

Vit minnast øll, tá hann stuðlaði forboðið fyri hvalaveiði í suðurhøvum, nakað sum danski ráðharrin harmaðist um. Nú er reistur ein fyrispurningur á danatingi um grindadráp her á landi, og skal tað ikki undra meg, at Edmund enn einaferð fer í part við dønum í hesum málinum, og finnur so okkurt hann kann brúka at svína Høgna út við.

Eg veit ikki hvat Edmund Joensen tekst við í Keypmannahavn, tá hann er í Fólkatinginum, annað enn at sita og krympa tær, men tað kemur mær fyri, sum hann gongur á skeiði hjá fívlunum báðum Rolf Guttesen og Virgari Dalsgarð.